## 119 fólk vórðu handtikin

Tað var ófriður bæði undan og eftir stórdystin í donskum fótbólti í gjár. FCK og Brøndby spældu avgerandi dyst í Parkini, og einki mál kom í dystinum. Tað úrslitið kundi FCK betur liva við. Ekstrablaðið skrivar, at ófriður og rok var fleiri staðni í sambandi við dystinum. Uttanfyri eitt vertshús vóru 40 viðhaldsfólk tikin, og samlagt handtók løgreglan 119 fólk í sambandi við dystin.



## Ulrich er ikki tann sami

Týski súkklumaðurin Jan Ulrich er ikki tann, sum hann einaferð var, og hann hevur fingið fleiri vánalig úrslit í ár. Einaferð var hann sterkasti súkklarin í heiminum, men nú hevur hann ilt við at fylgja við teimum bestu. Heldur ikki í einkultstartinum er hann millum teir longstu longur, og í kappingini Kring Romandíið um vikuskiftið var hann langt afturi í røðini í endaligu støðuni. Fyrireikingarnar eru tí ikki av teimum bestu undan teimum stóru súkklukappingunum í summar.

EB/Streymur-Skála 2-0 (0-0):

# Hálvur tími í stórum stíli

*EB/Streymur*

*Skála*

**Framúr málverjin hjá Skála var orsøkin til, at heimaliðið á Mølini ikki vann meiri enn við tveimum málum**

EB/STREYMUR-SKÁLA
*Jóannes Hansen*



*Seinasta hálva tíman setti EB/Streymur ferð á, og so vunnu teir oddasessin aftur eftir eina viku fráveru*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

EB/Streymur vann sunnudagin oddasessin aftur. Tað gjørdu teir við 2-0 sigri á heimavølli móti Skála. Serliga síðsta hálva tíman var gott snitt yvir oddaliðnum, og tað var tá, at teir gjørdu tey bæði málini.

Fyrra umfarið var leikliga einki at reypa av. Vindurin, sum lá upp á tvørs, plágaði, og tá ið bólturin ofta var í luftini, so vóru fyritreytirnar fyri samanhangandi fótbóltsspæli einki serligar.

Í spælbýti vóru gestirnir væl við. Málmøguleikarnir vóru tó ikki so nógvir. Eina ferð noyddust teir á heimaliðnum at bjarga á strikuni, og heimaliðið átti ein góðan møguleika stutt undan steðginum. Skála misti í uppspælinum, Rafal setti ferð á, spældi Hans Paula Samuelsen, sum sneiddi framvið verjuspælara og royndi móti málinum. Bólturin fór framvið málverjanum og rakti í stólpan.

Tað sigur seg sjálvt, at Skála er darvað av, at fleiri av stuðulsspælarunum ikki eru tøkir. Sum 2. hálvleikur leið, gjørdist heima yvirvágin alt meiri týðulig, og nú fingu teir væl betri skil á fótbóltsspælinum, enn teir høvdu havt tað í 1. hálvleiki.

Vlada Filipovic var framúr aftasti skansi hjá alt meiri sperda Skála liðnum. Talan tóktist tó vera um tíðarspurning, áðrenn hol fór at koma á. Málið kom, tá ið 2. hálvleikur var hálvrunnin. Leif Niclasen, sum stutt frammanundan var innskiftur, setti hol á. Liðformaðurin og miðverjin Egil á Bø legði langa sending fram í høgra borð. Verjan beindi burtur við høvdinum, men Sorin Anghel, sum var komin fyri seg, hóast hann í vikuni næstan ikki hevði fingið stigið fótin til, var fyrstur á, spældi tvørtur um til Rafal, ið legði eitt sindur aftur eftir til Lei Niclasen, sum smekkaði til, og hesa ferð var Vlada Filipovic seldur.

Lætti og fagnaður millum heimamenninir sum hildu fram í somu øði. Eftir gott uppspæl millum Hans Paula og Rafal gjørdist Sorin blankur ikki so langt úr málinum. Skotroyndini bilti einki, og tað tóktist sum um, at bólturin var á veg í málið, tá ið Skála málverjin á framúr hátt megnaði at verja fyri.

EB/Streymur, sum var í 4-5-1 útgangsstøðu við Sorini Anghel einsamallum á toppinum, hevði stóra leikliga yvirvág, og tiggju minuttir undan dystarenda varð staðfest, at øll stigini fóru at vera eftir á Mølini.

Jóhann á Stongum, ið var komin á vøllin í 2. hálvleiki, spældi Sorin Anghel í vinstru, Sorin fór til baklinjuna, áðrenn hann sendi innfyri. Skála verjan megnaði í fyrstu atløgu at beina burtur, men ikki longri enn at miðvallarin Bárður Olsen, sum fyrr í ár hevur lagt upp til nógv av málunum, sum felagsliðið hevur fingið, kundi smekka til, og enn eina ferð sang bólturin í Skála málinum.

Heimafagnaðurin var øgiligur. Sum hann so ofta hevur verið tað á Skála tvey tey seinastu árini. Sunnudagurin í Gundadali móti B36 og mikudagurin í næstu viku á heimavølli móti KÍ fara at geva heilt góða ábending um í hvussu stórum álvara EB/Streymur skal takast í oddastríðnum. Í løtuni mugu teir finna seg í, at teir eru eitt tað besta og kanska tað besta boðið upp á nýtt meistaralið.

Tað skoðsmálið góvu mong Skála undan kappingarbyrjan. Gongdin í fyrstu seks umførunum hevur víst, at tað eru nýggjar tíðir á Skála. Fyritreytin undir, at tað skal fara at hilnast betri, enn tað higartil hevur gjørt, er fyrst og fremst at fleiri av teimum, sum higartil fyri tað mesta hava hugt at, tí teir ikki hava verið førir fyri at spæla, koma fyri seg aftur. Tað síggja teir fram ímóti skal gerast veruleiki á Skála. Men tað tekur sína tíð!

## Góð barlast

Heimamenninir á Mølini vóru ógvuliga fegnir um júst henda sigurin:

– Tað var týdningarmikið, at vit fótaðu okkum eftir tapið í Runavík. Nú standa tvær rættuligar lyklauppgerðir fyri framman. Fyrst í Gundadali móti B36 og so á heimavølli móti KÍ. Leikligu avrikini plaga ikki at vera serliga polerað, tá ið vit spæla móti Skála. Tí var tað fínt, at vit rættuliga fingu spælið at koyra soleiðis, sum 2. hálvleikur leið, var viðmerkingin hjá teimum í EB/Streymi.

2-0 málið var søguligt á tann hátt, at hetta var fyrsta ferðin yvirhøvur, at tað vórðu skorað fleiri enn eitt mál í grannauppgerðum millum EB/Streym og Skála á Mølini!

-jh

## Mugu royna sum frægast

Á Skála verður staðfest, at gongdin fyrsta partin av hesum kappingarárinum hevur verið heilt øðrvísi, enn hon hevur verið tvey tey undanfarnu árini. Í trimum royndum á útivølli hava teir bara fingið eitt stig - í Klaksvík.

– Vit eru manningarliga sperdir. 1. hálvleik eru vit nøgdir við. Tá vóru vit kanska leikliga omaná. Eftir steðgin fáa teir meiri flog yvir spælið, og teir sekta okkum, tá ið vit gera mistøk. Tað ber tó ikki til at missa mótið. Sunnudagin fáa vit vitjan av GÍ, og tá mugu vit royna at reisa okkum, er viðmerkingin av Skála.

Skálamenn hava bara fingið eitt stig burtur úr trimum teimum seinastu umførunum.

-jh